# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg skal viðganga, at tað er óheppið, um linjan ikki er greið*
*Karl Vidtfeldt*

# Gekk neyvan við dómstólinum



*Vóru kærumøguleikarnir hjá ÍF teir somu í dag, sum teir vóru fyri tveimum árum síðani, er ógvuliga sannlíkt, at Ítróttardómstólurin hevði strikað leikbannið, sum Bartal Eliasen hevur fingið*

**Úrskurðurin um at geva Bartali Eliasen leikbann, hevði neyvan gingið, var fótbólturin framvegis skipaður undir ÍSF. Áður hevur ítróttadómstólurin í øllum førum nokta sersambandi at broyta siðvenju grundað á einstakt mál**

FÓTBÓLTUR/ANALYSA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

1. januar í fjør var ein serstakur dagur innan føroyskan ítrótt. Hetta var nevnliga dagurin, tá FSF traðkaði út úr rættarskipanini hjá ÍSF, soleiðis at fótbólturin ístaðin hevði evsta vald í øllum fótbóltsviðurskiftum. Hetta sum partur av nýggjum UEFA- og FIFA-krøvum.

Soleiðis vórðu kærumøguleikarnir innan fótbóltin broyttir. Áður kundu mál, sum vóru viðgjørd í Kappingarnevndini, kærast til Dómsnevndina, og síðani kundu hesi aftur kærast til Ítróttadómstólin. Ein møguleiki, sum eitt nú HB brúkti í tí so væl kenda Páll Mohr Joensen-málinum.

Í dag er skipanin tann, at avgerðir hjá Kappingarnevndini partvíst eru suverenar. Millum annað, um leikbann ikki er longur enn tveir dagar. Og tað er júst tað, sum er galdandi við leikbanninum, sum Bartal Eliasen fekk í fyrradagin. Hetta kann nevnliga ikki kærast, og tí fær ÍF illa gjørt annað enn at akta harraboðunum.

### Høvdu fingið viðhald

Tað, sum er áhugavert í hesum er, at var gamla skipanin galdandi, kundi ÍF kært málið – um neyðugt til Ítróttadómstólin. Og nøgv bendir á, at felagið hevði fingið viðhald í síni kæru.

Tá talan er um leikbann, grundað á annað enn tað, sum dómarin hevur ført fram í frágreiðing sínari, so er talan nevnliga um fordømi, tó at hetta ikki er frá fótbóltinum.

Tá Stjørnan og Neistin fyri tveimum árum síðani spældu FM-finalur, kærdi Stjørnan eina hending, sum dómararnir ikki høvdu sæð, men sum varð fangað av myndatólinum hjá 3-2.

Kappingarnevndin gav ikki Stjørnuni viðhald í kæruni, men tað gjørdi Dómsnevndin, sum leikbannaði Nicoletu Radu Hansen fyri at hava sligið Báru S. Klakstein.

Neistin kærdi tó alt fyri eitt málið til Ítróttadómstólin, sum beint undan næsta finaludystinum kolldømdi avgerðina hjá Dómsnevndini.

Og grundgevingin var ógvuliga greið. Hóast HSF sum so ikki hevði nakað forboð ímóti at nýta sjónbandaupptøkur sum próvgrundarlag, so var ikki siðvenja fyri at nýta hetta. Ítróttadómstólurin metti avgerðina um at nýta sjónbandaupptøkur var somikið prinsipiell, at hetta ikki kundu setast í gildi í viðgerð av eini einstakari kæru. Víst varð tá eisini til, at hvørki nevnd ella aðalfundur hjá HSF høvdu tikið støðu til spurningin.

### Heimild uttan siðvenju

Hetta seinasta er tó ikki galdandi hjá FSF.

Í Felags stev-stevnuni í fjør varð óhøviskur atburður eitt av punktunum á skránni. Og feløgini fingu tá í rundskrivi at vita, hetta skuldi – ikki kundi – kosta leikbann í millum ein og tríggjar dagar.

Í so máta hevur FSF sínar heimildir í lagi. Trupulleikin er tó, at siðvenjan ikki hevur fylgt við. Í blaðnum í gjár nevndu vit dømi, har spælarar ella venjarar ikki vóru revsaðir. Eitt lítið mistak var tó í hesum, tí Kurt Mørkøre varð revsaður eftir dystin hjá B36 móti KÍ í fjør. Venjarin fekk tá tveir daga leikbann fyri útvísing sína og atburð sín eftir hesa. Men tað varð ikki staðfest, um hetta var fyri úttalilsi síni eftir dystin. Tá segði venjarin, at tað var trupult hjá B36 at gera nakað, tá dómarin longu hevði gjørt av, hvør skuldi vinna dystin.

Og í øllum førum slapp Christian Lundberg púrasta snikkaleysur, tá hann eftir dyst millum NSÍ og GÍ í fjør kom við mest sum identiskari útsøgn.

Tí er talan í veruleikanum um spildunýggja siðvenju, nú Bartal Eliasen verður revsaður. Ein siðvenja, sum verður sett í gildi í viðgerð av eini einstakari kæru, og tað var júst hetta, sum Ítróttardómstólurin átalaði í kærumálinum millum Neistin og Stjørnuna.

# Óheppið við ógreiðari linju

**Karl Vidtfeldt, sum í fjør var formaður í Kappingarnevndini, vil illa gera ítøkiligar viðmerkingar til málsviðgerðir í fjør. Men hann ásannar, at tað helst eru lutir, sum kundu verið viðgjørdir øðrvísi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*HYPERLINK "mailto:jakup@sosialurin.fo" jakup@sosialurin.fo*

Karl Vidtfeldt, sum enn er limur í Kappingarnevndini hjá FSF, var í fjør formaður í somu nevnd.

Tað merkir samstundis, at hann var formaður í teimum førum, har spælarar ella venjarar ikki hava verið revsaðir fyri útsagnir, sum annars væl kundu komið undir somu reglu sum hana, ið Bartal Eliasen nú er revsaður eftir.

Og hann viðgongur, at tað til tíðir kann vera trupult at síggja greiðu linjuna, sum helst skal vera í, tá discipliner-mál verða viðgjørd.

- Vit hava gjørt feløgini varug við hetta. Tað gjørdu vit á fundi í fjør, har reglur innan økið eisini vórðu útflýggjaðar feløgunum.

Men hyggur tú eftir dømum frá í fjør, so vóru útsagnir, sum beinleiðis vendu móti integritetinum hjá dómarunum, ikki revsaðar?

- Ikki heilt. Kurt Mørkøre fekk tveir dagar fyri sítt reyða kort. Og har var talan so um longt leikbann, sigur Karl Vidtfeldt.

Er hetta so, so merkir tað væl, at orðini um, at dómarin hevði gjørt av, hvør skuldi vinna dystin, hava kostað ein dag. Er tað ikki ein utsøgn, sum er grovari, enn at dómarin dugir hvørki at floyta ella renna?

- Tað var í eini samlaðari meting, at vit tá góvu tveir dagar. Í hesum førinum við Bartali hava vit so eisini mett, at talan skuldi verða um tveir daga leikbann, sigur Karl Vidtfeldt.

Hann viðgongur samstundis, at ikki visti um útsagnirnar hjá eitt nú Christian Lundberg, sum annars vóru at hoyra á kykmyndum á portalinum og kundu lesast í Sosialinum.

Um FSF skal nýta slíkar útsagnir sum grundarlag undir revsing. Setir tað so ikki krav um, at tit hoyra og síggja allar viðmerkingar, sum verða gjørdar í miðlunum? Hóast alt hava bløðini túsundtals lesarar, eins og kykmyndir av fótbóltsdystum hava úti við 2.000 downloads fyrsta samdøgurið.

- Tað havi eg sagt frá fyrsta degi. At verður hetta tilfeldið, so fær Kappingarnevndin nokk at síggja til. Og eg skal viðganga, at tað er óheppið, um linjan ikki er greið. Tað er eitt mál, sum vit altíð royna at halda, og sæð í bakspeglinum, so vilja tað altíð vera viðurskifti, sum vit kundu gjørt øðrvísi.

- Men við støði í málinum, sum nú er viðgjørt, haldi eg, at vit hava sett eina linju, sum øll kenna, um líknandi dømi koma fyri, sigur Karl Vidtfeldt.